# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Søgulig uppstilling

Tað er ikki ov nógv sagt, at uppstillingin í gjárkvøldið av Barck Obama sum valevni til forsetavalið í USA er ein søgulig hending, og talan er sostatt eisini um eina søguliga uppstilling. Hetta er fyrstu ferð, at ein afroamerikanari er vorðin stillaður upp til týdningarmesta politiska starv í heimsins mætasta stórveldi. Fyrstu ferð, at ein afroamerikanari yvirhøvur tók lut í landsfundi demokratana var í 1936, so her er nógv hent, um hugsað verður um javnstøðu millum tey hvítu og afroamerikanarar. Obama er framúr væl skikkaður sum forestavalevni. Hóast komin úr smáum korum, so fekk hann sera góða útbúgving sum løgfrøðingur frá bestu universitetum í USA, Harward og Columbia. Hann var kosin senatorur fyri statin Illinois eftir at hava verið virkin í lokalpolitikkinum í heimstatinum. Uppstillingin er sostatt ein sera týðandi hending í søguligum høpi og ein varði í stríðnum fyri javnstøðu millum ymsu rasurnar í USA.

Amerikansku veljararnir sleppa nú at velja millum tvey sera ymiskar valevni. Munurin millum politisku sjónarmiðini hjá McCain og Obama er sum dagur og nátt. McCain er á mongum innanríkispolitiskum økjum enn meira konservativur enn Busch. Hann er ser harðrendur í spurninginum um rættindi hjá samkyndum, um fosturtøku og hann gongur inn fyri, at deyðarevsing skal nýtast nógv meira enn í dag. McCain vil lække skattirnar hjá meðal- og yvirstættini. Uttanríkispolitiskt fer hann helst at tosa meira við Europa, men hann vil samstundis herða kríggið í Irak, og hann hevur fleiri ferðir mælt til at bumba Iran.

Obama hevur alla tíðini verið í andstøðu til kríggið í Irak, og hann er fyri eini meira diplomatiskari kós í mongum truplum uttanríkispolitiskum málum. Hann vil hava heilsu- og almannaverkið broytt og vil tryggja teimum umleið fýrati milliónunum, sum als onga sjúkratryging hava, eina sømiliga skipan, so øllum amerikanarum stendur viðgerð í boði. Obama hevur eisini eina nógv bleytari støðu enn McCain í málum um rættindi hjá samkyndum og í spurninginum um fosturtøku. Hann gongur eisini inn fyri einum meira ábyrgdarfullum umhvørvis- og veðurlagspolitikki, hann er ímóti skattalætta hjá teimum ríku, og hann fer at seta tiltøk í verk til tess at minka um útlátið av $CO_2$. Í spurninginum um deyðarevsing er hann ikki heilt greiður - honum dámar ikki hesa revsing. Hann hevur talað um at endurskoða alla rættarskipanina, og hann vil ikki útilokað, at henda revsing kann vera neyðug í heilt serstøkum førum.

Tað eru sostatt tvey sera ymisk valevni, ið nú bjóða seg fram til forsetavalið í heyst. Metingarnar eru sum vera man ymiskar, og tað eru eygleiðarar sum halda, at Obama bert fer at reka politikkin hjá Clinton víðari, meðan McCain serstakliga í mun til Europa fer at reka ein øðrvísi politikk enn t. d. Busch hevur rikið. McCain er illa dámdur í Busch hópinum, og hetta kann koma honum til góðar við valið. Tað verður sostatt ein sera spennandi dystur og flestøll vóna broytingar til ta betra fyri USA. Við hesum í huga er Obama besta boðið við tað, at hann stendur fyri teimum størstu búskaparligu, umhvørvsligu og sosialu broytingunum.

**Sosialurin**

# UMMÆLI

HERI MOHR



Í eini hálvari øld hevur læknin, rithøvundurin, samfelagsrevsarin, og debatørurin Tage Voss skrivað umleið 40 bøkur umframt at røkja sítt læknastarv.

Fyri kortum fylti hann 90, og tá kom hann út við bókini *Stemme i ørkenen*. Hesar stuttsøgur eru verdar at lesa. Tær fingu rósandi ummæli í Weekendavisen (Ulrik Høy) 13. juli.

Í 20 ár var Tage Voss lækni á oynni Christiansø – til støddar sum fimtingurin av Mykinesi – í ein landnyrðing úr Bornholm. Oyggin gjørdist ein fjølbroytt verð í hansara hugaheimi – til sjónvarpið "gjørdi sína entre" har á oynni.

Ein av teimum mongu stuttsøgunum eitur "Læknar – ein hóttan móti heilsuni." Í bíðirúminum sita sjúk fólk. Oyrnastingir, tannsvull, nasablóð, hovnir fingrar, spýgging, brotið hondlið. Onkur skal hava váttan til koyrikort ella lívstrygging. Men 90% eru sjúk. Soleiðis var tað fyrr í tíðini, men hetta er broytt við árunum. Í dag eru 90% av teimum í bíðirúminum ikki sjúk. Tey koma til kanningar, til árligt eftlirlit, til blóðtrýstmáting, til gravid-itetskanning. Tey koma, tí tey hava illgruna, okkurt farligt, vilja kannast, sissast. Tey koma fyri at fáa resept til heiluvág fyri svøvnloysi, órógv, angist, pínu ella bara, tí tað er tryggari at taka heilivág enn ikki at taka hann. Tey koma ikki, tí at tey eru sjúk, men tí tey fegin vilja hava váttað við læknakanning, at tey eru ikki sjúk. "Hvussu hevur tú tað?" "Eg veit ikki, eg havi ikki verið hjá læknanum fyri kortum".

Fyrr góvu læknar góð ráð til tann einstaka, sum bað um tað. Í dag geva teir góð ráð til øll, uttan at nakar hevur biðið um tað. Tað er vorðið eitt yrki at selja sjúkraváttan og gera óneyðugar kanningar. Sum treyt fyri at fáa lívstrygging, almannaveiting, starvssetan o.a. krevst læknaváttan um góða heilsu. Sum treyt fyri at fáa pensión ella endurgjald krevst læknaváttan um vánaliga heilsu. "Um tú roykir, kannst tú ikki fáa íbúð í okkara raðhúsum". Og so framvegis. Skjótt gongur við tí fullkomnu manipulerandi persóntýningini í føgru nýggju verð. Gerst tú sjúk/ur, er tað tín egna skuld, tí tá hevur tú ikki í odd og egg fylgt læknaráðum. "Tú fært ikki lunguni oyðiløgd av dálkaðum regni og bilosa, tað skaðar bara jarnkonstruktiónir og standmyndir – nei, tú hevur roykt sigar, mín góði vinur! Tað er pínadoy tín egna skuld."

Ein onnur søga eitur "Hendurnar".

Vit hava mist okkara hendur. Vit hava ikki brúk fyri teimum, í mesta lagi fremstafingur til at trýsta á knapparnar til tastaturið, og tað kundi eins væl verið gjørt við einari tá ella nøsini. Tað kann sigast, at handanna snildi er leinging av heilanum. Hvat hendurnar gera, skal fyrst hugsast. Men hvat hevur heilin at teinkja við uttan hansara stóru goymslur av erfaringum. Tað eru handanna royndir í mong ár, sum opna fyri konstruktivum hugflogi. Yvirliving, trygg-gleikin var í vissuni um, at hendurnar megnaðu tingini fyri okkum, sum tær so mangan høvdu gjørt. Skipsbrotnir menn kundu gera sær nýtt skip við øks í hond. Alt kundi gerast við knívi sum einasta amboð. Nú leggja vit frustrerað frá okkum, um ikki eitt spesialborð til ta elektrisku borumaskinuna er við hondina.

Leikutoy hjá børnum í øllum aldri verður í rúgvum keypt við vegleiðing á fleiri málum. Einki at gera, einki at broyta. Í øldir bygdu børn hús úr klássum, og skip og bátar og boga og píl gjørdu tey úr træi og øðrum tilfari. Tá øktist hugflogið so við og við. Nú eru hillarnar stappaðar við modellum av bilum og morðvápnum og ljótum plastikgladiatorum, fiktiónsuniversum við rúmdarkanning, (sum hvørki børn ella framleiðarar skilja, og sum ætlandi ongantíð hava verið til), hóttandi og ágangandi. Og við slíkum ídnaðarsniðgivnu discount hugmyndum uttan samband við veruleikan eta børnini (og vaksin) úr teimum kommersiellu hondunum, til fremstifingur so líðandi kann leiða tey inn í telduheimin, har alt kann henda og eingin sleppur undan, og sum tey einki kunnu gera við.

Hetta at sita óvirkin við einum virknum fremstafingri manipulerandi livandi rúmdarskrímsl og kokainiseraðar rokkarar og sadistiskar yvirgangskroppar krevur sín prís. Um stutta tíð, eini tvey ættarlið ella so, eru minnini um handanna harradømi yvir umhvørvi farið í gloymskuna.

Lítli Óli dugur væl at spæla við teldu, og hann kennir fleiri loyniorð til spøl – eitt nú ragnarok, rúmdarkríggj, ismukríggj. Tey eru sera spennandi at spæla við um morgunin og eisini um kvøldi. Jú, tá ið hann verður stórur, verður fremstifingur kringur. Men hvussu fara vit at yvirliva? Longu nú er yvirlivilsi treytað av psykologhjálp, kreppuhjálp, guru, chakra, healing og astrologi. Eingin megnar nakað sjálvur, eingin hevur álit á egnu mátt og megi. Tað ónda kemur uttanífrá, tað góða kemur eisini uttanífrá. Ein bingo-lottotilvera, hvar tað stendur til hepni, kjans, lagnu og forsjón. Við handanna avmakt er nú samskifti millum mennisku farið. Í staðin fyri hava vit fingið fartelefon – ella telefonsvarara. Hendurnar gera munin.

Hetta eru brot úr bókini *Stemme i ørkenen* við smávegis uppískoyti. Í bókini eru 52 skemtiligar og álvarsligar stuttsøgur, hugleiðingar, og sum longu sagt, eru tær verdar at lesa.

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Tróndur Skaalum trondur@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hogni@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Dorit Hansen dorit@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Árni Joensen arni@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13$^{30}$

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.